Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 26. mai 2023
Mál nr.: 23/11758
Málsviðgjørt: efr

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslóg um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 1. Landsstýrismaðurin fær við hesi løgtingslóg, sbr. §§ 3-5, heimild at áseta nærri reglur um at seta í gildi tiltøk, við støði í avmarkandi tiltøkum, samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja virðing fyri fólkaræði, mannarættindum og altjóðarætti í sambandi við atgerðir, sum máa undan ella hótta sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina. *Stk. 2.* Tiltøk sum kunnu ávirka fiskivinnuavtalur við onnur lond, ella sum avmarka útflutning av fiskavørum og matvørum kunna ikki setast í verk uttan við heimild í serstakari løgtingslóg.	**§ 1.** Landsstýrismaðurin fær við hesi løgtingslóg, sbr. §§ 3-5, heimild at áseta nærri reglur um at seta í gildi tiltøk, við støði í avmarkandi tiltøkum, samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja virðing fyri fólkaræði, mannarættindum og altjóðarætti í sambandi við atgerðir, sum máa undan ella hótta sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina.